2. útbjóðing á landgrunninum:

# Átta oljufeløg vilja vera við

**Trý av feløgunum er nýggj**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Eftir øllum at døma ynskja 8 smærri, meðalstór og stór oljufeløg at vera við í oljuleitingini á landgrunninum, nú umsóknir til 2. útbjóðing skuldu vera inni fyri middag í gjár. Feløgini eru Statoil, ChevronTexaco, Shell, Dong, OMV, Faroe Petroleum, Geysir og Atlants Kolvetni. Tey fýra stóru oljufeløgini, sum vórðu við í 1. Útbjóðing fyri fýra árum síðani, BP, Amerada Hess, BG og ENI eru ikki við hesaferð. Men tey eru tó øll virkin á landgrunninum við sínum seks og níggju ára loyvum.

Feløgini komu øll á fund í Oljufyrisitingini í gjár og løgdu fram umsóknir sínar, einar 5-7 í tali. Millum feløgini eru trý nýggj, Tey eru ChevronTexaco, OMV og Geysir. Sigast má alt fyri eitt, at tað er sera hugaligt fyri føroyskar oljumyndugleikar, at eitt av heimsins størstu oljufeløgum, ChevronTexaco eisini vil vera við í leitingini á landgrunninum. Felagið er annars sera virkið hinumegin markið, og nú tað og onnur feløg, sum eisini eru virkin á okkara langrunni, eru farin at søkja um loyvi saman allarhelst beint upp at markinum, so er tað sera lovandi fyri føroyska oljuleiting. At upplýsingar frá stórum fundum beint hinumegin markið eisini kunnu brúkast á okkara landgrunni av somu feløgum, er einki minni enn ein fongur fyri føroyska oljuleiting.

Partur av ChevronTexaco, nevniliga fyrrverandi Texaco søkti eisini um leiti loyvi í 1. rundu, men teir vóru ov stuttir tá. Nú felagið hevur tvífaldað sína støðd og styrki og er saman við feløgum sum Statoil og Dong kann hugsast, at vit í teimum fáa eitt sera gott og vælkoyradni lokomotiv á landgrunninum. Bíðað verður so sjálvandi eisini eftir, at BP lokomotivið skal fara í gongd aftur.



*Rúni Hansen, stjóri í Statoil, heilsar upp á Sigurð í Jákupsstovu frá Oljufyrisitingini*



*Bæði oljufeløg og oljufyrisiting vóru vælhýrd*

OMV er eysturríkst felag og er sera virkið á Atlantsmótinum. Tað er m.a. við í fundum sum eru gjørd við markið og er tað kanska rættiliga n áttúrligt, at tað nú eisini vil kanna sær onkran bita okkara megin markið.

Geysir er somuleiðis nýtt á landgrunninum, men fólkini aftanfyri felagið, hava fyrr arbeitt við føroyskum øki, so her fær Atlants Kolvetni heilt givið ein góðar samstarvspartnara við góðum innliti í føroysku undirgrundina.

Vert er eisini at nevna Føroya Kolvetni, sum er tann stóri skorarin í seinastu runduni í bretskum øki. Nú vil felagið so eisini gera seg meira galdandi á landgrunninum, hvat eisini er heilt náttúrligt. At felagið ikki er ein og hvør sæst m.a. um vit lesa seinastu útgávuna av altjóða oljublaðnum Upstream, har blaðið brúkar ikki minni enn tríggjar síður uppá føroyska oljufelagið og serstakliga stjóra tess, Graham Stewart, sum fær nógv rós og verður vístur stóra virðing í oljuumhvørvi. Ikki kann sigast annað enn , at slík skriving vekir stóran ans fyri Føroyum og leitingini eftir olju her.



*Umboð fyri Atlantic Petroleum og Geysir møttu vælhýrd*



*Niels Sørensen frá Føroya Kolvetni kom við umsókn*

Sigurd í Jákupsstovu:

# Væl nøgdur við umsóknir

OLJULEITING
*Jan Müller*

– Hetta er positivt og eri eg eisini væl nøgdur. Feløg, sum arbeiða miðvíst báðumegin markið hava bjóðað í 2. rundu, og tað er sera lovandi sigur Sigurd í Jákupsstovu, stjóri á Oljufyristingini, nú staðfest er, at eini 8 oljufeløg hava bjóðað. Tað hevur ikki fingið Sigurd í Jákupsstovu at missa vónina, hóast stór feløg sum BP, Amerada Hess, BG og ENI ikki hava søkt, tí tey eru longu virkin á landgrunninum. Hann heldur, at tað er áhugvert at síggja, at mong av feløgunum, sum arbeiða bæði í bretskum og føroyskum øki, nú eru við í 2. Útbjóðing eisini, tí jarðfrøðin kennir sum so ikki mørk. Herfyri segði Sigurd í Jákupsstovu, at um bert eitt felag søkti, so fór hann at vera vónsvikin. Men søktu 3 feløg, so tók hann tað sum nakað positivt. Nú er úrslitið so 8 feløg og Sigurd og hansara fólk fara nú til verka at lesa umsóknirnar og síðani at koma við tilmælum um loyvi. Hetta verður fyrst í komandi ári.